## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 31 | 15 - 12 - 4 | 51 | 26 | 25 | 57 |
| 2 | Brøndby | 31 | 16 - 7 - 8 | 68 | 38 | 30 | 55 |
| 3 | Silkeborg | 31 | 14 - 11 - 6 | 44 | 32 | 12 | 53 |
| 4 | FCM | 31 | 13 - 10 - 8 | 47 | 42 | 5 | 49 |
| 5 | Viborg | 31 | 13 - 7 - 11 | 49 | 36 | 13 | 46 |
| 6 | AaB | 31 | 12 - 10 - 9 | 49 | 45 | 4 | 46 |
| 7 | Lyngby | 31 | 12 - 8 - 11 | 39 | 48 | -9 | 44 |
| 8 | OB | 31 | 12 - 7 - 12 | 46 | 43 | 3 | 43 |
| 9 | AGF | 31 | 12 - 4 - 15 | 48 | 56 | -8 | 40 |
| 10 | AB | 31 | 7 - 14 - 10 | 39 | 40 | -1 | 35 |
| 11 | Herfølge | 31 | 6 - 9 - 16 | 39 | 61 | -22 | 27 |
| 12 | HFK Sønderj. | | 311 - 7 - | 23 | 28 | 80 | -52 |
| 10 | | | | | | | |

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 27 | 17 - 8 - 2 | 69 | 22 | 47 | 59 |
| 2 | Frem | 27 | 16 - 6 - 5 | 63 | 29 | 34 | 54 |
| 3 | Køge | 27 | 15 - 8 - 4 | 56 | 30 | 26 | 53 |
| 4 | Vejle | 27 | 14 - 8 - 5 | 63 | 33 | 30 | 50 |
| 5 | Farum | 27 | 14 - 5 - 8 | 55 | 37 | 18 | 47 |
| 6 | B93 | 27 | 12 - 4 - 11 | 49 | 41 | 8 | 40 |
| 7 | Brønshøj | 27 | 12 - 2 - 13 | 50 | 54 | -4 | 38 |
| 8 | AC Horsens | 27 | 9 - 10 - 8 | 35 | 36 | -1 | 37 |
| 9 | B 1913 | 27 | 9 - 9 - 9 | 35 | 41 | -6 | 36 |
| 10 | Hvidovre | 27 | 9 - 8 - 10 | 49 | 47 | 2 | 35 |
| 11 | Randers F. | 27 | 9 - 6 - 12 | 39 | 48 | -9 | 33 |
| 12 | Skive | 27 | 7 - 8 - 12 | 44 | 64 | -20 | 29 |
| 13 | Fremad A | 27 | 6 - 7 - 14 | 36 | 55 | -19 | 25 |
| 14 | FC Aarhus | 27 | 5 - 9 - 13 | 35 | 64 | -29 | 24 |
| 15 | Ølstykke | 27 | 6 - 6 - 15 | 33 | 73 | -40 | 24 |
| 16 | Birkerød | 27 | 2 - 4 - 21 | 34 | 71 | -37 | 10 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 9 | 8 - 0 - 1 | 29 | 9 | 20 | 24 |
| 2 | Viking | 9 | 7 - 2 - 0 | 21 | 9 | 12 | 23 |
| 3 | Molde | 9 | 5 - 2 - 2 | 21 | 11 | 10 | 17 |
| 4 | Brann | 9 | 5 - 1 - 3 | 25 | 15 | 10 | 16 |
| 5 | Lillestrøm | 9 | 5 - 1 - 3 | 16 | 14 | 2 | 16 |
| 6 | Stabæk | 9 | 5 - 1 - 3 | 13 | 16 | -3 | 16 |
| 7 | Odd. Grenl. | 9 | 4 - 2 - 3 | 15 | 10 | 5 | 14 |
| 8 | Moss | 9 | 4 - 1 - 4 | 12 | 13 | -1 | 13 |
| 9 | Sogndal | 9 | 3 - 0 - 6 | 9 | 20 | -11 | 9 |
| 10 | Bryne | 9 | 2 - 2 - 5 | 10 | 16 | -6 | 8 |
| 11 | Lyn | 9 | 1 - 3 - 5 | 11 | 15 | -4 | 6 |
| 12 | Tromsø | 9 | 2 - 0 - 7 | 5 | 15 | -10 | 6 |
| 13 | Strømgodset | 9 | 1 - 3 - 5 | 10 | 24 | -14 | 6 |
| 14 | Bodø/Glimt | 9 | 1 - 2 - 6 | 6 | 16 | -10 | 5 |

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Den Bosch + | 34 | 23 - 6 - 5 | 64 | 25 | 39 | 75 |
| 2 | Excelsoir + | 34 | 20 - 6 - 8 | 89 | 63 | 26 | 66 |
| 3 | FC Zwolle + | 34 | 18 - 10 - 6 | 73 | 41 | 32 | 64 |
| 4 | Cambuur/L. | 34 | 15 - 9 - 10 | 55 | 52 | 3 | 54 |
| 5 | Volendam + | 34 | 16 - 5 - 13 | 58 | 48 | 10 | 53 |
| 6 | G.A. Eagles | 34 | 16 - 5 - 13 | 62 | 63 | -1 | 53 |
| 7 | Telstar | 34 | 15 - 8 - 11 | 47 | 48 | -1 | 53 |
| 8 | Helmond Sp. | 34 | 13 - 9 - 12 | 69 | 50 | 19 | 48 |
| 9 | Eindhoven | 34 | 12 - 9 - 13 | 58 | 57 | 1 | 45 |
| 10 | Top/Oss | 34 | 14 - 3 - 17 | 59 | 67 | -8 | 45 |
| 11 | Emmen | 34 | 11 - 8 - 15 | 53 | 64 | -11 | 41 |
| 12 | Dordrecht '90 | 34 | 10 - 10 - 14 | 58 | 59 | -1 | 40 |
| 13 | MVV | 34 | 12 - 4 - 18 | 47 | 58 | -11 | 40 |
| 14 | BV Veendam | 34 | 11 - 6 - 17 | 54 | 69 | -15 | 39 |
| 15 | Heracles A. | 34 | 10 - 9 - 15 | 38 | 56 | -18 | 39 |
| 16 | ADO Den Haag | 34 | 9 - 9 - 16 | 51 | 71 | -20 | 36 |
| 17 | Haarlem | 34 | 8 - 10 - 16 | 46 | 64 | -18 | 34 |
| 18 | VVV | 34 | 8 - 4 - 22 | 37 | 63 | -26 | 28 |

B36 – GÍ 1-2 (1-1)

# GÍ fekk fyrsta sigurin

**Gøtumenn ognaðu sær fyrsta sigurin landskappingini, tá teir megnaðu at basa einum heldur tamum B36 liði**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Eftir eina ógvuliga vánaliga byrjan hjá GÍ, megnaðu teir fyri fyrstu ferð at fara at vøllinum við trimum stigum. GÍ tapti tríggjar teir fyrstu dystirnar, men seinastu tveir dystirnar hava teir fingið fýra stig. GÍ er spakuliga farið at hála seg uppeftir stigatalvuni.

Tað var heldur óvæntað, um hugt verður eftir stigatalvuni, at GÍ skuldi fara úr Gundadali við trimum stigum. B36 lá í oddinum við átta stigum, meðan GÍ bara hevði tað eina og lá aftast.

Men gøtumenn hava savnað sær eitt líkinda lið, sum kappingin er liðin. Tí eydnaðist tað at basa havnarmonnum.

### B36 betri byrjan

Tað var annars B36, sum fekk eina betri byrjan í tí ringa veðrinum leygardagin. Ein langur bóltur varð sendur úr verjuni fram móti brotsteiginum. Framherjin Tórálvur Poulsen longdi við høvdinum til ein púra frían Allan Manai, sum róliga sendi framvið málverjanum.

Hetta var miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og tað var júst byrjanin, sum heimaliðið ynskti. Tað var tí lagt upp til enn eitt tap til gøtumenn, men teir vildu tað øðrvísi.

Spælið gekk heldur javnt á ta seinnu løtuna fyri steðgin. Eingin veruligur málmøguleiki var til nakað av liðunum, men brádliga hevði GÍ javnað.

Spælt var ígjøgnum í høgru síðu, og bólturin varð sendur innfyri. Har stóð Páll Rói Poulsen og høvdaði uttalaga úr brotsteiginum. Hóast málverjin fekk hondina á bóltin, datt hann innum strikuna.

### GÍ fekk sigursmál

Miðskeiðis í seinna hálvleiki fekk GÍ tað avgerandi málið, sum gav teimum sigurin. Ein bóltur varð sendur inn í brotsteigin, sum datt fyri føturnar á Omari Pálsson. Hann var takladur í tí, hann skuldi skjóta, men bólturin støkk ístaðin til Dánjal Paula Dalbø, sum kundi leggja GÍ framum úr stuttari fjarstøðu.

At byrja við í fyrra hálvleiki fekk B36 eitt mál kolldømt, tá málskjúttin var mettur at vera rangstaddur eftir hornasparksstøðu.

Eftir hetta legði B36 trýst á GÍ málið. Havnarmenn sendu nógv fólk fram á hálvuna hjá GÍ, men lítið kom burturúr teimum mongu royndunm. GÍ verjan stóð stinn, og heimaliðið hevði ógvuliga fáar veruligar málmøguleikar.

GÍ fekk sostatt sín fyrsta sigur til høldar, meðan B36 næstan misti Skála úr eygsjón í oddinum.



*Eftir at teir hava fingið fýra stig teir báðar seinastu dystirnar, eru gøtumenn so smátt farnir at kaga longur upp á stigatalvuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### B36 – GÍ 1-2 (1-1)

1-0: Allan Manai
1-1: Páll Rói Poulsen
1-2: Dánjal Pauli Poulsen

# Herfølge er fallið

**Bygdarliðið á Sælandi hevur sagt farvæl við superliguna, Jákup Mikkelsen og harvið ivaleyst eisini stuðulin frá fótbóltsáhugaðum føroyingum**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

At tað gongur upp og niður her í verðini, og at tað ofta er stutt og skjótt frá tindinum og niður í dalin er so ofta at síggja og hoyra. Ikki minst í fótbólti sást hetta aftur og aftur.

Fyri einum ári síðani vóru stóru yvirskriftirnar hjá okkum og hjá donsku pressuni, at Herfølge í toppinum í superliguni helt fram at renna undan øllum hinum. Støðan var so óvæntað, at fjølmiðlar nógva staðni kring Europa tóku í sjáldsomu tíðindini, og rómurin mundi ongan enda tikið, tá Jákup Mikkelsen sum fyrsti føroyingur nakrantíð og allir hinir í Herfølge fingu handaðar gullkrónur, DM steypið og rættin til Europa Cup.

Síðani tá hevur gingið av skriðuni, og sunnudagin varð seinasti naglin settur í. Nú er tað greitt, at Herfølge eftir summarsteðgin skal spæla í næstbestu deildini.

### Jákup helt frí

Fyri einari viku síðani søgdu vit, at nú var Jákup Mikkelsen arbeiðsleysur. John Faxe Jensen vil hava, at málverjin, sum skal standa ímillum stólparnar komandi ár, fær fleiri royndir, og tí var tað Claus Uldengaard og ikki Jákup Mikkelsen, sum var í málinum hjá Herfølge, tá teir sunnudagin vóru í Haderslev og spældu ímóti longu niðurflutta Sønderjylland.

Herfølge gjørdi tað, sum teir kundu. Hóast heimaliðið kom á odda, tá níggju minuttir vóru farnir, so svaraði Claus Hermansen aftur fýra minuttir seinni, og ellivu minuttir undan leikloki skoraði Dennis Conteh sigursmálið. Tað sóu 1.495 áskoðarar.

### AB setti naglan í

Men hóast Herfølge fekk trý stig, so varð niðurflytingin veruleiki. Einasta liðið, sum Herfølge kundi røkka undan triði síðsta umfarinum, var AB. Teir høvdu vitjan av Viborg, og AB vann 2–0. Málini skoraðu teir í 66. og í 67. minutti. Harvið hevði AB syrgt fyri, at meistararnir frá í fjør fara at spæla í næstbestu deildini komandi kappingarár.

Hví tað skuldi ganga so av skriðuni hjá Herfølge, hevur tað verið tosað og skrivað nógv upp og niður um. John Faxe Jensen staðfesti sunnudagin, at tey trý umførini í Europa Cup ivaleyst høvdu kostað teimum stig í fyrstu tíðini í hesum kappingarárinum, og at mettan frá DM ivaleyst hevði borið við sær, at spælararnir ikki høvdu verið so uppsettir, sum teir vóru í DM árinum. Og so er tað ein veruleiki, at tað kom illa við, at Herfølge síðsta summar seldi tveir av bestu spælarunum, og at tveir aðrir av DM liðnum rýmdu.

Jákup Mikkelsen kemur í vikuni heim til landsdystirnar, og harvið er tíðarskeiðið í Herfølge liðugt hjá honum, og tað man fara at vera so sum so við áhuganum fyri Herfølge ímillum fótbóltshugaðar føroyingar.

### AGF í holpa

Tað er ikki so langt síðani, at AGF var í eygsjón hjá Herfølge. Nógvu tey síðstu umførini hevur tað bara gingið rætta vegin hjá Århus, og sunnudagin settu teir trumf á. OB hevði ikki tapt í sjey dystum upp í slag, og seinastu tvær ferðirnar høvdu teir vunnið 4–0 ímóti AGF.

Men hagtølini høvdu lítið at siga hjá AGF. Hóast heimaliðið í Odense leikliga so avgjørt ikki lá undir, so vann AGF við ikki minni enn 4–0, og nú verður møguleikin nevndur, at AGF fer at røkka plássi í Intertoto Cup.

Í Aalborg var karneval leygardagin. Áskoðararnir til dystin ímóti FCM ætlaðu sær gott lag. Teir fingu ein kvøkk, tá FCM kom á odda, men tað endaði væl. AaB vann 2–1, og teir ætla sær framvegis pláss í UEFA Cup.

# Tey tvey K´ini

**Í 80´unum og mestapartin av 90´unum vórðu Gary Kasparov og Anatoly Karpov tey tvey stóru K´ini. Seinastu árini hevur ein annar traðkað í fótasporum Karpovs, nevnliga Vladimir Kramnik sum í sterku kappingini í Kasakstháan liggur á odda saman við Kasparov**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*




*Á myndini síggjast teir báðir risarnir. Sum kunnugt, verður annar teirra, Kasparov, heilt skjótt at síggja í Føroyum, tá hann verður gestur hjá talvfelagnum*

Tað er sum tað plagar. Kasparov og Kramnik eru á odda, meðan hinir ikki megna at fylgja við í Astana, Kasaksthan.

Umframt tey tvey K´ini luttaka eisini superstórmeistararnir Alexander Morozevich, Alexei Shirov og Boris Gelfand. Lokali Darmen Sadvakasov er eisini sloppin í part.

### Støðan eftir 6. umfar

| | |
|---|---|
| Kasparov | 4,5 stig |
| Kramnik | 4,5 |
| Gelfand | 3,5 |
| Shrirov | 2,5 |
| Morozevich | 2 |
| Sadvakasov | 1 |

Hesir seks eru nú í gongd við seinnu helvt av kappingini, teir telva nevnliga dupultumfar sum gevur tíggju umfør.

Oddamennirnir byrjaðu eins væl, høvdu eftir trimum talvum báðir hálvtriðja stig, og møttust yvir talvborðið í fjórða umfari. Sera nógv varð tosað um hetta talv, hetta avgerandi talv. Kasparov hevði svarta fólkið og leikti Grunfeld byrjanina, sum hann annars tapti við júst ímóti Kramnik í HM dysti teirra í oktober. Talvið vardi stutt, men tó varð skjótt komið út í endatalvið har Kramnik hevði lítlan fyrimun, men bispapar Kasparovs bjargaði honum hálva stigið.

Kramnik vann lættliga á Morozevich í fimta umfari, meðan hann mátti taka til takkar við javnleiki ímóti Gelfand í sætta umfari. Kramnik hevur víst gott spæl og góðan teknikk, serliga í endatalvinum.

Kasparov fekk ikki sín vilja í fimta umfarinum, tá hann sera óvæntað leikti javnt ímóti tí lokala manninum Sadvakasov, sum hevur styristalið 2585. Kasparov hevði hvíta fólkið, men fekk ikki avviklað fyrimunin í miðspælinum til sín vinning. Í sætta umfari vann hann tó aftur, hesaferð enn einaferð á Shirov, sum enn ikki hevur megnað at vunnið á Kasparov. Shirov bardi seg til nærum javna støðu, men fall beint í eina heldur einfalda mátfellu. Talvið er við í blaðnum í dag.

Boris Gelfand, uppruna-liga úr Hvítarusslandi, men sum nú umboðar Ísrael, hevur leikt sera væl. Hann tapti fyrsta umfar ímóti Kramnik, men hevur reist seg av álvara, og tykist at verða tann einasti sum kann hótta teir fremstu. Hann vann eitt gott talv á Morozevich, sum ikki hevur havt eydnuna við sær. Morozevich tapti fýra talv á rað, men vann í sætta umfari á øðrum sinni á Sadvakasov.

Shirov hevur ikki leikt eins væl sum hann plagar. Enn kann hann tó bjarga kappingini. Sadvakasov fekk ringa byrjan við ongum stigi eftir triðja umfari, men við sínum javnleikum í fjórða og fimta umfari ímóti Shirov og Kasparov er hann væl á veg.

### Endabrak

Tað verður allarhelst Kasparov ella Kramnik sum vinna hesa kapping. Fýra umfør resta í, og ringt er at siga hvør er favorittur at enda ovastur. Helst er størri kjansur at teir býta fyrsta pláss millum sín, enn at ein teirra kemur einsamallur á mál.

Møguliga hevur Kasparov besta møguleikan eftirsum hann hevur hvítt ímóti Kramnik í sonnum toppbraki í tíggjunda og seinasta umfarinum. Kramnik hevur tó serliga gott tak á Kasparov við svarta fólkinum, hann tapir nevnliga ikki. Hetta seinasta talv verður avgerandi, og fara tá øll heimsins talveygu at eygleiða júst hesum talvinum, sum verður víst beinleiðis á www.kasparovchess.com og http://astana.fide.com Kappingin endar 1. juni.

### Kongurin á veg

Nú nærkast av álvara. Kasparov er á veg til Føroyar frá 8-12. juni, og so er hann eisini væl fyrireikaður. Hann fer sum kunnugt at leika simultandyst ímóti seks av okkara fremstu telvarum, og hevur hann tá studerað talvini hjá okkara landsliðstelvarum. Flóvin Tór Næs hevur givið avboð til dystin, hann fer til Svøriki at telva eina IM-kapping, men maður kemur í mans stað og verður hesin Ólavur Simonsen.

Fullfíggjaða skráin hesar dagarnar tá Kasparov er í Føroyum, verður at síggja í blaðnum í komandi viku.

## Talvið hesa vikuna

**Kasparov,G (2835) - Shirov,A (2722)**
**Astana 2001 (6), 26.05.2001**

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Nc3 Nf6 4.e5 Nfd7 5.f4 c5 6.Nf3 Nc6 7.Be3 cxd4 8.Nxd4 Bc5 9.Qd2 0-0 10.g3 (Kasparov kallaði hendan leik ein sokallaðan bíðileik. Enn er gjørligt hjá honum at velja báðar borgir) 10...Qe7 11.0-0-0 Nb6 12.Nb3 Bxe3 13.Qxe3 Bd7 14.Kb1 Rfc8 15.g4 Nb4 16.Nd4 Rc5 (eyðkend støða hjá Shirov. Nógvir møguleikar at offra í støðuni, men Kasparov leikar neyvt næstu leikirnir og forðar offrum) 17.a3 Nc6 18.Ncb5! (far tamarhald á d4 punktinum, og verjir tá riddarin eisinu c2 finnuna) 18...Nxd4 19.Nxd4 Rac8 20.Bd3 (ein góður útviklingsleikur, sum samstundis er álopsleikur) 20...Nc4 21.Qh3 h6? (betri var: 21...g6 22.Bxc4 dxc4 23.Qc3 gevur fyrimun til hvítan, men ikki avgerandi) 22.g5 Nxa3+!? (Shirov offrar, men er eisini noyddur. Mótspæl er neyðugt) 23.bxa3 Rc3 24.gxh6 g6 25.Qg2 (ivasamt. Betri var at leika frúnna á g3, tí tá kann hon via h4 leikast á f6 við mát, um svarta frúgvin fer í álop. Um Kc1-d2, fær svartur gott spæl eftir Rc4 og Rxa3) 25...Rxa3 26.Nb3 Qb4 27.Bxg6 (Kasparov avviklar til betri endatalv, men tó er enn lív í støðuni hjá Shirov) 27...Rxb3+ 28.cxb3 Qxb3+ 29.Qb2 Qxb2+ 30.Kxb2 fxg6 31.h4 Kh7 32.h5 Kxh6 33.hxg6+ Kxg6 34.Rhg1+ 0



Kf5?? (sigast skal at Shirov var í tíðarneyð, men átti hann at sæð næsta leik hjá Kasparov. Ein syrgiligur endi hjá Shirov sum ikki tykist at hava nervarnar á røttum plássi tá mótstøðumaðurin eitur Kasparov. [34...Kf7 Einasti leikur, men tungt verður kortini hjá Shirov at halda støðuna saman. 35.Rd2! og rókarnir arbeiða væl saman. Næsti leikur er Rh2] 35.Rd4! (kann ikki verja Rg5#) 1-0

# KÍ-stuðlafelag

**Klaksvíkingar í Havn hava nú tikið seg saman til tess at stuðla ítróttinum í Klaksvík**

STUÐLAFELAG
*Jákup Mørk*

Hin 8. mei tóku klaksvíkingar í Havn stig til at stovna felag, sum hevur til endamáls at stuðla ítróttinum í Klaksvík.

Sagt verður, at menn leingi høvdu gingið og teskað í krókunum, uttan at nakað ítøkiligt tó var hent hesum viðvíkjandi. At enda var so ein bólkur, sum tók seg saman, og stovnandi aðalfundurin varð so hildin 8. mei.

Sagt verður, at limaskapurin í felagnum er rættiliga fríur. Lítlar og ongar bindingar eru á limunum, aðrar enn tær, sum endamál felagsins áseta. Fyrst og fremst er felagið ætla sum ein stuðul hjá KÍ, tað verið seg fíggjarliga og sum áskoðari, men harumframt er eisini ætlanin, at felagið skal skipa fyri hugnatiltøkum av ymsum slag, samkoyring til dystir og annað, sum fellur limunum til hugs.

Limagjaldið er ásett til í minsta lagi 25 kr. um mánaðin, og sagt verður annars, at tað sjálvandi stendur øllum í boði at gerast limir.

Í fyrstu nevnd felagsins eru Edvard Olsen, Sigmund Poulsen, Oddbjørn Joensen, Eyðfinnur Guðjónsson og Sjúrður Guðjónsson.

# Føroyingar skilja Toda

**Á einari sonevndari quick-poll á heimasíðuni, portal.fo, tykjast flestu føroyingar at skilja avgerðina hjá Toda**

**Jónsson um ikki at spæla á føroyska fótbóltslandsliðnum**

LANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

Spuringurin, sum verður settur á heimasíðuni, er, um tað var rætt av Toda at geva avboð til landsliðið. Av teimum ikki færri enn 3.500, sum høvdu svarað sunnukvøldið, søgdu 57% avgerðina vera í lagi. 32,6 hildu ikki, at Todi hevur gjørt rætt, meðan 10,4% søgdu seg ikki vita.

# Útselt

**Áhugin er stórur fyri at síggja Toda og teir í FCK dystast móti Brøndby**

FÓTBÓLTSFERÐIR
*Jákup Mørk*

Tað er ikki sørt, at áhugin fyri at síggja í Parkini er stórur, nú stórdysturin móti Brøndby nærkast. Vit skrivaðu í undanfarna hósdagsblaði okkara, at North Atlantic Football Agency (NAFA)í samstarvi við Atlantic Airways skipaði fyri til dystin, og ikki kann sigast annað enn, at fólk hava tikið væl ímóti hesum.

Jákup í Stórustovu, sum rekur NAFA, sigur við Sosialin, at tær 50 ferðirnar, sum felagið hevði bjóðað út, snøgt sagt vórðu skræddar burtur. Klokkan níggju fríggjamorgunin byrjaði tey at taka ímóti bíleggingum á skrivstovuni hjá Atlantic, og beint eftir døgurða var útselt.